# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ábyrgdarleyst drál við flogtrygd

Leygardagin hevði útvarpið hjá KVF sera álvarsom tíðindi, ið mugu fáa allar viðkomandi myndugleikar at ressast. Tíðindini snúu seg um, at skaðanevndin hjá donsku verjuni fyri fleiri árum síðani hevur mælt til, at ávísar tøkniligar ábøtur áttu at verið gjørdar við flogvøllin í Vágum. Hetta snýr seg fyrst og fremst um ein sonevndan veðurradara, ið kann geva betri upplýsingar um veðurviðurskiftini á og kring flogvøllin í Vágum í samband við fráferð og lending. Í frálíka væl frágingna innslagnum hjá starvsfeløgum okkara í Sortudýki var frásøgn um eina fráferð fyrr í ár, sum danskir loftferðslumyndugleikar meta var á markinum til tað forsvarliga. Í innslagnum var sera áhugaverd samrøða við tann, ið var flogskipari hendan túrin. Flogskiparnin, ið man vera ein tann mest royndi skiparin hjá Atlantsflogi, greiddi sakliga og gjølla frá viðurskiftunum í samband við innflúgving og fráferð, og í hesum sambandi greiddi hann eisini gjølla frá tí, sum var hent hendan dagin. Eingin orsøk er at ivast um frágreiðing hansara. Skipararnir tóku sína avgerð um fráferð við støði í teimum veðurupplýsingum, ið vóru til taks, og avgerðin var sum so sakliga grundað.

Sostatt tykist ongin orsøk vera at finnast at sjálvari avgerðini um at fara á flog henda illveðursdagin. Hinvegin er tað sera álvarsamt fyri allar partar, at flogskiparin undir samrøðuni letur skilja, at útgerðin í Vágum til veður-, serstakliga, trubulens-upplýsingar, kundi verið nógv betri. Skiparin sigur bart út, at hesi seinastu árini er ikki hent nakað av týdningi reint tøkniliga á hesum øki við flogvøllin í Vágum. Høvdu hesar tøkniligu ábøtur verið gjørdar og tøknin verið til taks, ja, so varð kanska ikki lagt so nógv fyri hendan dagin, tá komið var at markinum. Síðan hesa hending hevur Atlantsflog broytt mannagongdir, ið skulu tryggja, at slíkt ikki skal kunna koma fyri aftur. Tað er sjálvsagt bara gott og ein lætti at vita sær hjá teimum mongu, sum nýta flogleiðina árið í kring og sum kanska ikki altíð eru líka álvulig, tá farið verður av stað á vetrardegi í nógvum vindi.

Vit skuldu sostatt verið tryggjað móti eini endurtøku av hesi ótespiligu fráferðini í februar í ár. Hinvegin er tað sera átaluvert, at avvarðandi myndugleikar ikki hava látist um vón, sjálvt um teir leingi hava vitað, at her er tørvur á tøkniligum ábótum, og at tann neyðuga tøknin er til at fáa. Tað er sera átaluvert, at avvarðandi myndugleikar snøgt sagt ikki hava rætt hond frá síðu í hesum máli, og spurningurin er, um ikki hetta drál er á markinum til fyrisitingarligt og politiskt ábyrgarloysi. Henda støða kann ikki sleppa at standa við, og almenningurin hevur krav uppá, at myndugleikarnir alt fyri eitt taka neyðug stig til tess at bøta um flogtrygdina við fráferð og lending. Vit hava yvirtikið flogvøllin, ábyrgdin er nú hjá føroyskum myndugleikum. Latið okkum nú síggja her og nú, at hesir myndugleikar megna at liva upp til hesa ábyrgd

**Sosialurin**

## Visiónin krevur hamskiftan hugburð - vilja vit tað?

**TÓRA VIÐ KELDU**



Málið í visión 2015 er at gerast ein av heimsins bestu í skúlaskapi. Skulu vit røkka hesum máli, tørvar okkum eina radikala hugburðsbroyting á øllum skúlaøkinum.

Tað var serliga eftir tiltiknu PISA kanningina, at fólk fóru at umrøða føroyska fólkaskúlan. Heldur enn rós ella eggjan, bar kjakið brá av svartskygni, og fleiri vóru, sum hildu, at fólkaskúlin ikki var nóg góður. Tó var ein glotti at hóma; øll vóru á einum máli um, at okkurt mátti broytast - so avgjørt.

**Føroyar, ein av teimum bestu**
Í kjalarvørrinum av PISA kom visión 2015 undan kavi. Eitt dygdarverk, sum er væl orðað, og visiónin má sigast at vera sera greið. Tó ivist eg, um avvarðandi í fjøltáttaðu skipanini - sum skúlin er - hava gjørt sær greitt, hvussu nógv hetta krevur.

Á heimasíðuni www.2015.fo, sum avgjørt verd er at vitja, havi eg hug at steðga við eina serstaka orðing: "Føroyar skulu innan 2015 verða millum tey fremstu í heiminum innan fyri undirvísing í fólkaskúlanum..." Stutt og greitt, men gævið satt at málið kundi verið rokkið eins stutt og greitt.

**Skúlin sera samansettur**
Tá ið vit siga fólkaskúli, lýsa vit júst tað, sum liggur í orðinum. Hetta er fólksins skúli. Øll eiga skúlan og hava ábyrgd av næmingunum, sum her hava sína dagligu gongd. Tó vísir tað seg dagliga, at øll kenna als ikki hesa ábyrgd.

Fólkaskúlin er sera samansettur og eru tað nógv ymisk lið, sum geva okkum lidnu myndina av skúlanum. Fyrst Mentamálaráðið og kommunan, síðani leiðsla, lærarar, næmingar, foreldur og afturat hesum allir teir ymsu tættirnir, sum í dag eru vorðnir náttúrligir partar av undirvísingini.

Eg kundi væl farið í smálutir, men í stuttum er hetta langt frá stutt og greitt. Tað sigur seg sjálvt, at í einum verki við ótalligum liðum skal miðvíst arbeitt til, har øll kenna sítt pláss og sína uppgávu.

**Øll mugu gera sítt**
Skal skúlin verða ein av heimsins bestu, er tað als ikki nóg mikið, at bert ein ella nakrir av pørtunum taka neyðugu tøkini. Tað skulu allir gera. Í stóru myndini er tað ikki ein bólkur, sum hevur minni ella størri týdning. Allir eru við til at geva næminginum ein góðan, spennandi og mennandi skúladag - tað er jú næmingurin sum, tá alt kemur til alt, er tann, sum vísir endaliga úrslitið.

**Visiónin er greið**
Eg haldi, tað er rætt at hava greið mál. Tá so Visión 2015 vil hava føroyska fólkaskúlan upp á hægri støði, er skrivaða visiónin svart á hvítt tó ikki nóg mikið. Um tey, sum hava ávirkan og ábyrgd ikki føra hana út í verkið, er visiónin deyð. Visiónin skal inn í hjartað á fólkinum, her skal hart arbeiði, krøv og nýhugsan til - ein hugburðsbroyting.

Vit skulu síggja fólkaskúlan við visiónsbrillum, síggja eitt gott fakligt støði, foreldur og avvarðandi sum eggja og skapa góðar umstøður í heiminum, næmingar sum arbeiða og lærarar, sum seta eina góða, greiða og mennandi dagsskrá. Allir partar skulu til arbeiðis og arbeiða miðvíst og arbeiða saman, um vit skulu koma á mál. Á fleiri av umrøddu økjum eru vit eftirbátar.

**Ikki óavmarkaðar pengar**
Vit liva í einum lítlum og viðkvomum samfelagi, sum, í verandi støðu, ikki hevur møguleikar at seta óavmarkaðar pengar í skúlan. Hetta mugu vit bara síggja í eyguni. Tá hetta er sagt, haldi eg tó, at pengar eru langt frá tað einasta, sum skal til. Tí hvar síggja vit viljan at fremja visión 2015 í verki? Eg haldi, at okkum manglar eina greiða virkisleið, viljan og eldhugan. Hetta er eitt so mikið høgt mál, at eg dugi illa í mínum dagliga arbeiði sum lærari at síggja, at allir partar skilja, hvat hetta vil siga.

Eg havi eisini hug at spyrja: Hví skal málið fyri føroyska fólkaskúlan verða, at vit skulu vera best í heiminum? Latið okkum byrja við at fáa næmingar rættstundis, mettar og útsvøntar í skúla og at gera skúlating. Afturat hesum at hava taskuna fulla av bókum og kravdu amboðunum, teir skulu brúka. Á ein ella anna hátt eru vit ikki komin longri enn hetta. Slík virðing fyri skúlanum er minsta krav og neyðug fyritreyt, um vit skulu gera okkum nakrar dreymar um at koma longur fram á leið.

Eftir míni meting krevur visiónin hamskiftan hugburð - vilja vit hetta?

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.